# Fleiri dreingir hava lesi og skrivitrupulleikar

**Tað eru serliga dreingir, sum ikki duga so væl at lesa og skriva. Í vetur fer áhugafelagið fyri lesi- og skriviveik at skipa fyri kvøldskúla-undirvísing undir Tórshavnar Kvøld-og Ungdómsskúla í Havn**

KVØLDSKÚLI
*Vilmund Jacobsen*

Ungdómar og vaksin, sum hava lesi-og skrivitrupulleikar, fáa nú møguleika at fara á skeið hjá Tórshavnar Kvøld-og Ungdómsskúla í vetur.

Anna Karin Kjeld í Funningsfirði er ein av stigtakarunum til og formaður í áhugafelagnum hjá lesi-og skriviveikum.

Felagið hevur eina nevnd, sum telir sjey limir, sum øll eru avvarðandi at børnum og ungdómum við hesum trupulleikum. Felagið hevur 40-45 limir um meginpartin av landinum.

Hon sigur, at felagið hevur arbeitt við at fáa í lag skeið fyri lesi-og skriviveik í langa tíð, og nú verður hetta so veruleiki í vetur.

Í fyrstu syfti er ætlanin at hava eitt kvøld um vikuna, men verður undirtøkan stór, er ikki óhugsandi, at talan verður um tvey kvøld.

## Øll vælkomin

Í lýsing vísir áhugafelagið á, at ungdómar og vaksin, sum eru 14 ár og eldri, kunnu tekna seg til skeiðið á tlf. 441541 ella 317755.

- Um tit kenna onkran, sum tit meta hevur tørv á einum slíkum skeiði, eru tit vælkomin at lata okkum frætta, sigur Anna Karin.

Hon væntar ikki, tað verður so lætt at fáa fólk at geva seg til kennar, tí lesi- og skriviveik eru vanliga lítillátin og duga væl at krógva hesar trupulleikar.

- Men eingin eigur at halda seg aftur, tí hetta kann vera avgerandi skumpið til at koma eitt stig víðari, antin til aðrar skúlar ella bara til at klára seg betur í gerandisdegnum.

Áhugafelagið fyri lesi- og skriviveik hevur í tí stilla arbeitt við trupulleikanum í eini 2-3 ár, og tá ið aðalfundur verður aftur í november, er ætlanin at skipa felagið meira "legalt", sum tikið verður til.

- Vit hava havt fundir við ymiskar myndugleikar og fundir runt ymsastaðni, og nú er tað so hent, at skjøtil er settur á.

Anna Karin sigur, at felagið er sera takksamt fyri stuðulin, tey hava fingið á skúlanum á Trøðni, og tað verður ein lærari frá sernámsdeplinum, sum kemur at taka sær av undirvísingini á kvøldskúlanum.

- Undirvísingin byrjar, so skjótt vit hava nóg mikið at næmingum til skeiðið. Sum er, hava vit fýra næmingar, men pláss er fyri fleiri. Tí er ikki at halda seg aftur, sigur hon.

Tá ið eitt hóskandi tal av næmingum hava teknað seg, verður lærari settur. Hann fer síðan at kalla næmingarnar saman, og tá ið tað er gjørt, byrjar undirvísingin.



*Skeiðið fyri lesi-og skriviveik er ætlað ungdómum og vaksnum, sum hava tungt við at lesa og skriva. - Hetta er ein nógv størri trupulleiki, enn vit geva okkum far um, sigur Anna Karin Kjeld.*

*Myndin er tilvildarlig*

## Orðblind

Anna Karin vísir á, at tey flestu, sum hava ilt við at lesa og skriva, eru tað, tey rópa, orðblind.

- Hetta vísir seg allar oftast at ganga útyvir dreingirnar. Vit eru sjey foreldur í nevndini í áhugafelagnum, og øll eiga vit dreingir, sum hava hesar trupulleikar. Eg veit bara um eina gentu í felagnum, sum er orðblind, sigur hon.

Anna Karin sigur, at lesi- og skrivitrupulleikarnir millum ung og vaksin eru nógv størri, enn fólk vanliga geva sær far um.

- Hetta hevur vanliga einki við skil at gera. Flestu, sum hava hesar trupulleikar, eru ógvuliga skilagóð. Tey duga hinvegin væl at krógva trupulleikarnar og snúgva sær undan. Men hesi kunnu læra bæði at lesa og skriva. Tað gongur bara eitt sindur seinni og krevur meira tíð og arbeiði, um tú ert orðblindur.

Hon sigur, at ungdómar og vaksin, sum ikki hava lært at lesa og skriva, sum oftast eru orðblind – tað, at eyguni og heilin ikki samarbeiða, men tað eru eisini tey, sum síggja illa, ið kunnu vera afturútsigld á hesum øki.

- Eingin hevur tikið sær nakað serligt av hesum trupulleikanum og tey, sum hava hesar trupulleikar, vilja helst sleppa undan at tosa um teir. Tí vilja vit nú royna hetta skeiðið, og vit vóna, at tað fær neyðugu undirtøkuna. Eingin skal halda seg aftur við at koma, sigur Anna Karin Kjeld.

Hon vísir á, at fólk kunnu altíð ringja til hennara (441541) og spyrja seg fyri.

# Tað gongur hampiliga á Høvdanum

**Handilsmaðurin, Eivind Jacobsen, ætlar at byggja ein stóran handil á Strondum um nøkur ár**

HANDIL
*Vilmund Jacobsen*

Um hálvan juli í ár broyttist handilsmynstrið á Strondum. Tá yvirtók Eivind Jacobsen handilin hjá Kára Hansen á Høvdanum og handilin hjá Poul Godthardi, Stranda Sentrum. Eivind avgjørdi at lata Stranda Sentrum aftur og halda fram við handlinum á Høvdanum. Poul Godthard gjørdist dagligur leiðari á Høvdanum.

Eivind Jacobsen sigur, at neyvu tølini yvir gongdina eru ikki tøk enn, men hann heldur, at tað hevur gingið hampiligt, síðan hann yvirtók handlarnar.

- Tað er tungt at reka matvøruhandlar í kapping við teir stóru, men eg havi ongar ætlanir um at gevast á hendur.

## Ætlar at byggja

Eivind sigur, at hann hevur ætlanir um at byggja upp ein stóran handil á Strondum, sum hevur eitt nógv størri úrval enn bara matvørur.

- Kommunan arbeiðir við eini býarætlan, og tá ið hendan fyriliggur, fæst ein ábending um, hvar ein slíkur handil kann byggjast, sigur Eivind.

Enn vil hann ikki siga, hvat úrvalið í nýggja handlinum verður, men hann leggur dent á, at matvøruparturin verður ikki sleptur, men mentur upp aftur meira.




*Væntandi ganga ikki nógv ár, fyrr enn Eivind Jacobsen hevur bygt ein nýggjan og nógv størri handil á Strondum.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

- Eg hugsi um eitt minni SMS við einum eigara, sigur hann og leggur aftrat, at ætlanin er, at alt skal vera ein handil og ikki fleiri, tí tað er dýrari í arbeiðslønum.

- At byggja ein handilsbygning kostar einki aftur ímóti at hava fleiri starvsfólk; tí hugsi eg í fyrsta lagi um ein stóran handil við stórum og fjølbroyttum vøruúrvali, sigur Eivind.

Eini 8-10 fólk eru í dag knýtt at handlinum á Høvdanum. Hetta gevur umleið 4 fulltíðarstørv.

Nær nýggi handilin á Strondum verður reistur, dugir Eivind Jacobsen ikki at siga í løtuni, men ætlanin er ikki, at tað skulu ganga fleiri ár, áðrenn nýggi handilin gerst veruleiki.

Á eystara armi á Skálafjørðinum er eisini ein annar rímiliga stórur matvøruhandil. Tað er Joma á Skála. Síðan er Kovin á Skála, sum er ein minni handil enn handilin á Høvdanum og Joma.



# Væleydnaðar konsertir í Norðurlandahúsinum



*Fyri fullum húsi fór seinna konsertin hjá Heimamissiónini fram leygardagin í Norðurlandahúsinum*

**Tvær konsertir fyri nærum fullum húsi Í Norðurlandahúsinum var úrslitið av sangskeiðinum, sum Heimamissiónin skipaði fyri. Fyrireikararnir lata sera væl at konsertunum**

KONSERT
*Solby A. Eliasen*

Tann fyrra konsertin fór av bakkastokki klokkan trý. Hon byrjaði við at barnakórið framførdi fýra sangir. Sosialurin fréttir, at framførslan hjá teimum var avbera góð, so ivaleyst mundu nógv sera stolt foreldur sita millum áhoyr-ararnar leygardagin.

Tá barnakórið var liðugt við teirra framførslu, kom stóra kórið, sum tað verður kallað, á pallin við norðmanninum Jostein Myklebust á odda. Hann var sera vælupplagdur, og hann leiddi kórið trygt og væl gjøgnum teir ymsu sangirnar. Sangstílurin var fyri tað mesta Black Gospel, men eisini vóru meira síðvandir sangir á skránni.

Kórið framførdi ellivu av teimum fimtan sangunum, sum tey høvdu vant á sangskeiðinum. So ikki kann annað sigast enn, at tey hava fingið nógv burtur úr á skeiðinum, sum endaði við báðum konsertunum leygardagin.

Hans Jákup Hansen, formaður í sangnevndini hjá Heimamissiónini, sigur, at tað er altíð betur at hava í meira lagi av sangum, tí tað skal helst ikki vera ov lítið. Tann fyrra konsertin vardi í umleið fimm korter, meðan tann seinna var heldur longri - umleið hálvan annan tíma.

Hans Jákup Hansen letur sera væl at konsertunum, men hann sigur tó, at tann seinna eydnaðist betur.

– Tað vil nokk altíð verða so, tá tað eru tvær konsertir. Tað eru fleiri nervar upp á spæl til ta fyrru og sangararnir skulu tá eisini føla seg fram. Meðan til ta seinnu eru tey greið yvir alt og slappa meira av tá. Og tá skulu tey heldur ikki spara seg til eina konsert afturat, og kunna tískil geva alt, sum tey hava, greiðir Hans Jákup Hansen frá.

Hóast konsertirnar vóru klokkan 15 og 17 leygardagin, so var nógv fólk. Til ta fyrru var ikki útselt, meðan tann seinna var fyri fullum húsi, og tað vil siga 340 fólk. Hetta var triðju ferð, at konsertirnar í sambandi við sangskeiðið hjá Heimamissiónini var í Norðurlandahúsinum.

– Vit vita frá undanfarnum árum, at áhugin fyri hesum konsertunum er stórur, og tí hava vit valt at hava tvær, sigur Hans Jákup Hansen, sum fegnast um, at bæði sangskeiðið og konsertirnar enn einaferð eydnaðust so væl.



*Fleiri solistar sungu á konsertini.*



*Dirigentur hjá stóra kórinum var norðmaðurin Jostein Myklabust, sum er kendur millum føroyingar, sum hava verið á Bíbliuskúla, har hann undirvísir*